Føroyskur unglingi á flogi:

# Ian er yngsti flogskiparin í Danmark

**Á 15 ára føðingardegi síðani gjørdist toftadrongurin Ian Gaardbo yngsti flogskiparin í Danmark. Hann flýgur sveimflogfør í Lemvig og ætlar sær nú víðari við útbúgvingini**

FLOGFØR
*Eyðun Klakstein*

Ein føroyskur unglingi er yngsti flogskiparin í Danmark í løtuni.

Ian Gaardbo var einsamallur á flogi á sínum 15 ára føðingardegi, og hann lendi við svimflogfarinum bæði trygt og væl. Hetta var fyrstu ferð, at Ian fleyg einsamallur, eftir at hann hevur verið 75 ferðir á flogi sum liður í útbúgvingini.

Ian byrjaði útbúgvingina sum sveimflogskipari í einum frítíðarfelagi í Lemvig seinasta heyst, og síðani hava instruktørarnir í felagnum undirvíst Ian – millum annað við eini rúgvu av flogferðum, har ein instruktørur hevur havt ábyrgdina.

Við hesum ferðum hevur Ian lært at flúgva í øllum hugsandi veðri og umstøðum, og hann hevur fingið ein umfatandi útbúgving í at flúgva sveimflogfør. Umframt allar ferðirnar á flogi hevur Ian eisini fingið bókliga frálæru í trygd og lógum, og hann hevur eisini verið gjøgnum eina læknaroynd.



Ian Gaardbo ger klárt til at fara einsamallur á flog í einum sveimflogfari



Ian Gaardbo ætlar sær nú víðari við útbúgvingini sum sveimflogskipari

### Øðrvísi føðingardagur

Tað ber til at fara undir útbúgvingina til sveimflogskipara sum 14 ára gamal, men tú skalt verða fyltur 15 ár fyri at kunna flúgva einsamallur.

Á sjálvum 15 ára føðingardegi sínum tók Ian hetta stigið, tá hann fleyg einsamallur. Hann var fyrst tveir túrar saman við einum instruktøri, men síðani fekk hann ábyrgdina av flogfarinum sjálvur.

Ian var á flogi í 10 minuttir, áðrenn hann lendi aftur, og tá fekk góða móttøku frá liðfeløgunum í Lemvig Svæveflyveklub. Sum vanligt vóru tað blómur til unga flogskiparan, sum í løtuni kann breggja sær av at verða tann yngsti av sínum slagi í Danmark.

Eftir enn eina soloferð varð lagkøka og føðingardagssangur á skránni í felagnum.

### Feðgar á flogi

Nú Ian kann flúgva einsamallur, fer hann víðari við útbúgvingini sum sveimflogskipari. Í løtuni kann hann flúgva í sveimflogfari, har pláss er fyri tveimum fólkum, men hann skal nú eisini í holt við einmansflogfarið, sum kann fara hægri upp í loft.

Hendan útbúgvingin endar við, at hann tekur eina endaliga flogroynd, sum kann geva honum endaligt sveimflogloyvi.

Áhugan fyri at flúgva hevur Ian ikki av ongum. Pápi hansara, Hilmar Gaardbo, flýgur eisini sveimflogør, og nú kunnu feðgarnir fara á ferð – á flogi.

# Stovnar gospelkór í Suðuroynni

**Stig eru nú tikin til at fáa gongd á eitt gospelkór í Suðuroynni. Tað er tónleikalærarin og messingblásarin Jens Knudsen, ið hevur tikið stig til kórið, eins og hann eisini setti á stovn gospelkór í Nyborg í lestrartíð síni, og hetta kór telur í dag 40 sangarar**

KÓR
*Dagfinn Olsen*



Jens Knudsen

Havnarmaðurin Jens Knudsen er tónleikalærari, messingblásari, í musikskúlanum í Suðuroynni. Eisini leiðir hann Tvøroyrar Hornorkestur.

Men hetta er ikki nóg mikið. Hann hevur av egnum áhuga tikið stig til eitt gospelkór í Suðuroynni. Og hann leggur dent á, at tað er fyri alla oynna. Tí hevur hann sett sær fyri, at venjingar fara fram helvtina av árinum í sunnaru helvt av oynni, og síðani hina helvtina av árinum í norðaru helvt av oynni. Tað vil siga í Vági og á Tvøroyri.

- Eg havi tikið stig til hetta av egnum áhuga og eg vóni, at undirtøkan verður góð, sigur Jens.

### Øll kunnu vera við

Jens er eldhugaður og brennir fyri hugsanini um eitt gospelkór. Hetta er heldur einki nýtt fyri hann, tí í lestarárárunum í Danmark setti hann á stovn eitt gospelkór í Nyborg. Hetta kór telur í dag heilar 40 sangarar.

Jens leggur dent á, at øll kunnu koma við, tí ongar treytir ella fyritreytir eru. Ongum nýtist at setast aftur, tí tey ikki duga nótar ella tí tey ikki hava sungið áður.

Sangskráin verður fjølbroytt og livandi og Jens heldur t.d. sjálvur nógv av Oslo Gospel Choir.

Jens heldur, at talan verður ikki um kapping við eittnú Kirkjukórið Ljóm í Vági, men heldur um eitt ískoyti til tað, ið er innan sang í Suðuroynni, tí t.d Ljómur er meira tað klassiska, meðan nýggja kórið meira ferðast í rútmiska partinum av tónleikaheiminum. Og kemur ferð á ætlanina, so vónar Jens, at tað við tíðini ber til at fáa ljóðføri við eisini.

Jens Knudsen er útbúgvin tónleikalærari, almen musikpedagog, við Det Fynske Musikkonservatorium við kór- og orkesturleiðslu og messing sum sergrein.

Ætlanin er at hava venjingarnar týskvøld klokkan 19 og ætlanin er at byrja í Vági og síðani skifta norðurum seinni.

Fyrsta venjing verður 2. september klokkan 19 og Jens vónar, at nógv taka undir við kórinum. Til ber at frætta nærri við at ringja til Jens á telefon 223053.

Bilar

Nr. 186 • hósdagur • 27. september 2001 • 75. árg.

# Volvo í Gøteborg – hevur granskað ferðsluvanlukkur í 30 ár



*Úrslitið av kanningararbeiðinum hesi seinast 30 árini hevur havt við sær, at Volvo bilarnir í dag hava hópin av innbygdum trygdarskipanum*

**Í yvir 30 ár hava Volvo í Gøteborg havt ein granskingarbólk, ið hevur til uppgávu at kanna ferðsluvanlukkur, har Volvo persónbilar hava verið innblandaðir. Hesin bólkur hevur havt avgerandi týdning í trygdararbeiðinum hjá Volvo**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hesin bólkurin til gransking av ferðsluvanlukkum bleiv settur á stovn í 1970, og var ein beinleiðis fylgja av tveimum umfatandi kanningum hjá Volvo í 1966 og 1967 av ferðsluni í Svøríki. Táverandi leiðslan í Volvo legði stóran dent á, at vitan og royndir frá veruligum ferðsluvanlukkum, skuldu savnast saman til gramleiðslumenningina hjá Volvo konsernini.

### Klár alt samdøgrið

Heilt frá byrjan av hevur granskingin hjá Volvo snúð seg um eina gjølla kanning av vanlukkustaðnum, og at gjøgnumganga hagtølini hjá teirra egna tryggingarfelag, Volvia. Við at tosa við tey, sum vóru innblandað í ferðsluvanlukkurnar, fáa tey eisini eina gjølla frágreiðing um persónskaðarnar. Granskingarbólkurin er klárur alt samdøgrið, og við álvarsligar ferðsluvanlukkur í Gøteborg økinum, har ein Volvo bilur er við, fær bólkurin beinanvegin boð. Læknin hjá bólkinum setur seg eisini í samband við sjúkrahúsið, sum hevur viðgjørt tey skaddu, fyri at fáa upplýsingar um skaðarnar.

### Kannað 28 tús. ferðsluvanlukkur

Í tey 30 árini, bólkurin hevur arbeitt, hava tey kannað umleið 28.000 ferðsluvanlukkur, har meira enn 40.000 persónar hava verið innblandaðir. Tann vitan og tær royndir, sum eru eitt úrslit av hesum arbeiði, hava verið við til at betra um tær verandi trygdarskipanirnar og at menna nýggjar. Hetta hevur havt við sær at Volvo bilarnir í dag hava hópin av innbygdum trygdarskipanum

*Kelda: Volvo Pertsonvogne Danmark A/S*




*Volvo 164 fyri 30 árum síðan, tá granskingarbólkurin, sum kannar ferðsluvanlukkur, har Volvo bilar eru innblandaðir, var settur á stovn*

## Opel Zafira sum Subaru



Eftir at Genaral Motors hava keypt partabrøv í Subaru, verða Opel Zafira seldir í Japan sum Subaru Travig. Opel Zafira verða gjørdir í fimm heimspørtum, sum Opel, Vauxhall, Chevrolet, í Austarliu eita teir Holden, og Subaru í Japan.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiat Stilo



Tað hevur kostað Fiat 6.7 milliardir krónur at menna nýggja Fiat Stilo, harav 5.2 milliardir til um og útbygging av verksmiðjuni. Fiat roknar við einum yvirskoti uppá 8 til 9 milliardir krónur í ár.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Corolla í Frankfurt



Á bilaframsýningini í Frankfurt verður nýggi Toyota Corolla sýndur fram. Corolla verða eftir ætlan gjørdir sum hatchback, sedan og Verso, ið er ein rúmligur bilur við fimm setrum.

*Kelda FDM /Motor*